## Pauli vunni gullnál

Pauli Øssurson Mohr úr Fuglafirði svam seg í FM-kappingini í vár til eina gullnál í 50 metra frísvimjing, sum hann svam í tíðini, 23,44 sekund. Umframt at hann er partur av oyggjaleikalandsliðnum, er Pauli eisini millum svimjarar til HM í Rom og Junior-EM í Prag. Metið, sum Pauli setti í FM-kappingini, var ananrs triðju ferð hetta svimjiárið, at PAuli setti nýtt met á teininum.




## Útlendingar

AB hevur í hesum døgum tveir mans til royndarvenjingar. Talan er um málverjan Andreas van Maarschalterweerd úr Danmark og framherjan Boguhe Leonce av Fílabeinsstrondini. Teir skulu venja við komandi tíðina, og síðan verður avgerð tikin, um felagið fer at gera sáttmála við teir, skrivar heimasíðan hjá AB.

# Ein sonn sólskinssøga

**Krista Mørkøre úr Klaksvík fekk sanna hetjumóttøku 2. hvítusunnudag. Gentan, sum hevði øll odds ímóti sær, kom tá heim við seks gullmerkjum frá svimjikapping í Berlin**

SVIMJING

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Dávur Winther*



*Ein errin familja. Tað eru bara tveir mánaðir síðan, at Krista varð løgd undir skurð, men í Berlin svam hon seg til seks gullmerki*

Annan hvítusunnudag var móttøka við svimjihøllina í Klaksvík, í sambandi við, at Krista Mørkøre hevur vunnið seks gullmerkjum frá stórari svimjikapping í Týsklandi, German Open

Eftir at pápin, Torkil Mørkøre, hevði takkað fyri móttøkuna og takkað fyri, at Krista var komin seg so væl, eins og at hon var ein góður vegvísari, helt varaborgarstjórin Jógvan Skorheim, røðu vegna Klaksvíkar Býráð.

Hann var sjónliga rørdur. Rørdur av bragdinum, og serliga av sendingini um Kristu í Kringvarpinum fáar tímar frammanundan, sum hugtakandi hevði greitt frá stuttu og torføru søguni um Kristu.

Fyri bert tveimum árum síðani var torført at siga, hvørja leið lagnan vildi bera hana eftir álvarsaman skurð í høvdinum. Læknarnir høvdu vissu um fleiri ting, hon ikki fór at kunna.

Men flestu hesi útlit og útsagnir hevur hon gjørt til skammar. Og nú í dag stendur hon við heili seks gullmerkjum frá stórari svimjikapping úti í heimi - German Open.

Hon kundi havt fingið átta, tí tíðirnar vóru til tað. Men vegna smáar feilir í tøkunum, vórðu tvey heiðursmerki strikað.

- Jú, Klaksvík stendur undrandi og hyggur at hesi lítlu, fitt og røsku gentu

– Kristu, sum vísir okkum ællum á leið, greiðir Dávur Winther, mentanarleiðari í Klaksvíkar kommunu frá.

– Hevur tú vilja og mót, so ber alt til!



*Nú veðrið var somikið gott, nýtti høvuðspersónurin høvið til at koma á móttøkuna á motorsúkklu*



*Hópur av fólki var komið saman við Svimjihøllina at heiðra Kristu*



*Vinkonurnar vóru eins ernar av gullmerkjunum, sum Krista sjálv var tað*